LM-099/2023

Fylgiskjal 2

Hoyringarsvar

Mál nr. : 23/25394 - Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Formæli

Lógaruppskotið nevnir í nøkrum umførum náttúruna og umhvørvi og sigur, at farast skal væl um og at avmarkingar kunnu gerast í ferðafólkatalið og virksemi, um mett verður at náttúran, umhvørvi og mentunararvur er hótt/ur.

Ábyrgdin verður í stóran mun løgd út til kommunurnar, saman við staðbundnum fólkum, at skipa ferðavinnuvirksemi. Hvar og hvussu tað kann fara fram.

Men royndir, bæði her heima og uttanlands, vísa at tað altíð eru peningaáhugamálini, sum draga longsta strái og fáa sín vilja. Orsøkin er at kommunurnar fyrst og fremst ynskja vinnuligt virksemi og skattakrónur og lítið ella slettis ikki, taka atlit til náttúru og umhvørvi. Nakað tað sama vil ger seg galdandi fyri fólki í økinum og á útoyggjunum. Sum fráliður gerast fleiri og fleiri partar av ferðavinnuni á einhvønn hátt og harvið fær peningur/vinningur fyrsta prioritet, framum náttúru og umhvørvi.

Tí er neyðugt at skráseta/kortleggja alla føroysku náttúruna og allar tættir í henni, so vit á upplýstum grundarlag, kunnu skipa so fyri at farið verður væl um, og um neyðugt gera avmarkingar í ferðafólkatalið og ferðavinnuvirksemi.

Skráseting/kortlegging

Støðan nú, hjá føroysku náttúruna og allir tættir í henni, skulu skjalfestast (dokumenterast) og niðurstøður skulu gerast fyri øll lendissløg, djórasløg, plantusløg osfr., um hvørt støðan er góð (grøn), í vanda (gul) ella hótt (reyð). Minsta mark og markvirði skulu ásetast fyri øll lendissløg, djórasløg, plantusløg osfr.

Bert eitt lítið dømi:

Lendi	**Fuglur**
• Lendisgreinin	• Nágreinilig fuglateljing
• Lendisætlan/friðing oa	• Neyv stovnsmeting
• Plantur oa	• Búøki
• Vøtn og áir	• Minsta tal fyri hvørt fuglaslag
• Smá djór (kykt oa)	• Friða/vard øki
Flogkykt oa	**Súgdjór oa**

Fakfólk við viðkomandi vitan, bæði lærd eins væl og sjálvlærd, skulu gera omanfyrinevnda arbeiði. Somuleiðis skulu tey gera ætlanir um røkt, umsiting og friðing.

Umsiting og eftirlit

Ein óheftur og vælvirkandi umsitingar- og eftirlitsstovnur, við greiðum lógar grundarlag, skal skipast. Stovnurin skal umsita og hava eftirlit við, at allar ásetingar verða fylgdar og hildnar.

Stovnurin kann ráðgeva kommunum, fyritøkum og einstaklingum, sum leggja til rættis ferðavinnuvirksemi úti í náttúruni. Stovnurin skal geva sína tilsøgn, áðrenn nakað ferðavinnuvirksemi úti í náttúruni verður sett í verk.

Umsitingar og eftirlitsstovnurin skal hava heimild til, at seta tiltøk í verk, fyri at verja náttúruna, við millum annað at avmarka atgongdina og/ella friða avís økið, djórasløg, plantur osfr. í styttri ella longri tíðarskeið.

Ein nevnd skal setast/veljast til stovnin, umboðandi óheftar náttúruverndar felagsskapir og óvildarlig fólk við serligum náttúruáhuga, leik sum lærd, so aðalmálið og kósin verður hildin.

Yvirvøka / Monitering

Stovnurin skal skipa fyri regluligum uppfylgjandi kanningum, td. 5. hvørt ár, fyri at staðfesta um og hvørjar broytingar henda í náttúruni, so vitanin altíð er dagførd.

Figging

Tryggjast má, at nokk av peningi verður avsettur á figgjarlógini til endamálið, á hvørjum árið. Peningurin skal røkka bæði til kanningar, greiningar og eftirlit (ferðavinnuskattur)

Eftirmæli

Alt bendir á, at vit fáa eina rættiliga stóra ferðavinnu. Stendur tað upp til Visit Faroe Islands (VFI) og vinnuna, so fer ferðafólkatalið at fleirfaldast tey komandi árini.

Ferðavinnan ger longu nú, sína neiligu ávirkan á náttúruna, so tað er í tøkum tíma at vit fáa omanfyrinevnda sett í verk.

Vinarliga

Abraham Mikladal
Gerðavegur 13
513 Syðrugøta